# Nógvar flogternur siga seg úr starvið

**Sjey flogternur hjá Atlantic Airways hava sagt upp síðstu tíðina. – Tað er torført at fáa familjulívið at fungera, um man arbeiðir sum flogterna, sigur Judit Falkvard, fyrrverandi flogterna**

FLOGFERÐSLA
*Inna Törnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Magni Arge váttar, at nógvar flogternur hava sagt seg úr starvi, og at fleiri eru ávegis at gera tað sama.

– Tað er ein viss útskifting í hesum starvinum, tað er tað allastaðni, sigur hann.

Fleiri av teimum, Sosialurin hevur verið í sambandi við, hava nevnt familjuna sum orsøk til uppsagnina.

– Hjá summun riggar tað væl at hava familju og flúgva, og hjá summun riggar tað slettis ikki, sigur Magni Arge. Tað kemur nógv ann uppá, hvussu netverkið sær út rundan um ein – um familjan kann passa børnini o. s. fr.



*– At flúgva í Noreg og verða burtur hósdag til sunnudag ber ikki til hjá mær, sigur flogterna hjá Atlantsflog*

*tilvildarlig savnsmynd*

Judit Falkvard hevur tvær lítlar døtur og ein mann sum er sjómaður.

– At flúgva í Noreg og verða burtur hósdag til sunnudag ber ikki til hjá mær, sigur hon.

At fara niður í tíð heldur Magni Arge ikki verða eitt gott hugskot.

– Tað er øguliga trupult at laga seg eftir tí, tá er kanska betur, at tey finna sær okkurt annað, sigur hann.

Hjá Atlantic starvast umleið 30 flogternur. Tey hava eisini lýst eftir nýggjum starvsfólkum, og umsóknirnar hava verið nógvar.

– Tað er ikki vegna tær nógvu uppsagnirnar, at vit lýsa eftir nýggjum fólki, vit økja um virksemið, og tí hava vit bruk fyri fleiri flogternum.

Onkur av flogternunum, vit hava tosa við, hava nevnt, at summar av flogternunum hava hug at skifta flogfelag til nýggja felagið FaroeJet. Ein persónur, Sosialurin hevur tosað við, sum hevur innlit í nýggja felagið sigur soleiðis:

– Atlantic søkir eftir flogternum, tað ger FaroeJet ikki – tað sigur væl eitt sindur.

## Atlantic á ferð til Írlands

Hetta vikuskiftið og næsta fara øll starvsfólkini hjá Atlantic Airways til Írlands.

Magni Arge, stjóri í felagnum sigur, at tey fara at hava starvsfólkadag og starvsfólkahugnað.

Tilsamans eru tað 120 fólk sum fara.

*Hvussu nógv kostar hetta?*

– Ja, transportkostnaðurin er ikki so stórur hjá okkum, eftirsum vit flúgva við egnum flogførum. Nakað tal upp á, hvussu nógv tað kostar havi eg ikki.

Er tað ikki eitt sindur dýrt, at øll skulu til Írlands?

– Tað haldi eg ikki. Tað er týdningarmikið við skilagóðum starvsfólkapolitikki, og við hesum vilja vit geva starvsfólkunum eitt herðaklapp fyri gott starv í farna árið, sigur Magni Arge.

# Føroyingar eru gávumildir og hjartagóðir

**Út við 1000 føroyskir jólapakkar frá sjómanskvinnuringum, samkomum, fyritøkum og privatpersónum gjørdu jólini hugnalig fyri russisk sjófólk kring Føroyar. Sjálvur fiskarí attachéurin á russisku Sendistovuni í Keypmannahavn hevur biðið Faroe Agency um at takka føroyingum**

SJÓMANSSKAPUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Um jóltíðir og árskiftið var nógv ferðsla frá og til skrivstovuna hjá Faroe Agency úti við Strond í Havn. Sum á hvørjum árið tóku Árni Dam og hini á fyritøkuni ímóti jólapakkum til russiska sjófólki, ið felagið umboðar. Pakkar, ið sjófólkið fekk at pakka upp, tá russisku jólini eru 7. januar.

### Út við 1000 pakkar

Árni Dam sigur við Sosialin, at í ár fingu tey út við 1000 pakkar inn. Hesir vóru koyrdir umborð á tey 16 skipini úr Murmansk og Arkhangelsk, ið felagið umboðaðið um jóltíðir. Gávurnar komu frá Sjómanskvinnuringum, samkomum, fyritøkum og ikki at forgloyma frá nógvum privatpersónum, ið gjørdu eitt stórt arbeiði við at samla pakkar inn.



*Árni Dam saman við skiparanum og stýrimanninum á trolaranum Mikhail Verbitskiy, ið var eitt av skipunum, ið fekk føroyskar jólapakkar*

*Mynd: Jóhan Christiansen*

### Gávumild og hjartagóð

Árni sigur, at tað er rørandi at síggja, hvussu gávumild og hjartagóð fólk eru. Privatpersónar koma á dyrnar við gávum dag eftir dag. Ofta er hetta fólk við tilknýti til sjófólk, ið kenna til tað at sakna síni kæru í jólatíðini. Men eisini onnur í bara ynskja at geva. Hetta vísir tað allar besta í fólki, sigur Árni. Hann er øgiliga takksamur fyri hetta stóra arbeiðið, ið verður gjørt heilt sjálvboðið, og sendur eina tøkk til øll hesi nógvu, ið hava givið.

### Hvør einstakur fekk gávu

Tað var sera gleðiligt, at kunna geva hvørjum einstøkum sjómanni eina jólagávu, sigur Árni. Hann sigur, at sjófólki er sera fegið um pakkarnar, ið gera jólini hugnaligari fyri hesi fólk, ið eru burturi frá sínum kæru í jólatíðini. Hann greiður frá, at vanliga er sjófólkið burturi í millum 5 og 8 mánaðar. Einasta sambandið heim er bløðini, ið koma við farmaskipunum. Her er eingin møguleiki hjá familjuni at senda pakkar, so føroysku gávurnar eru sera kærkomnar. Árni sigur, at so seint sum fyrradagin var ein skipari inni á skrivstovuni og takkaði fyri gávurnar, ið høvdu gjørt jólini umborð so nógv hugnaligari.

### Takksamir russar

Gávumildni hjá føroyingur er eisini komið stjórnini í Moskva fyri oyra, og fiskarí attachéurin á russiku Sendistovuni Keypmannahavn Yuri Piskarev, hevur ringt til Faroe Agency og biðið tey vegnað russar um at takka føroyingum fyri hesa stóru vælgerð.

### 25 jól við jólapakkum

Arbeiðið við at samla jólapakkar til russisk sjófólk byrjaði í 1981. 27. november 1981 kom fyrsta skipið á Skipasmiðjuna á Skála. Skipið og manningin var í Føroyum á jólum, og tí fór Árni í samstarvi við Sjómansheimi í Runavík at savnað inn gávur til manningina. Hetta hildu tey framvið í nógv ár. Tá skip komu til Vágs á skipasmiðju í 1985 ,fóru tey eisini undir at samla gávir inn til manningina á hesum skipum. Við árunum eru alt fleiri russisk skip komin til Føroyar og tí er rúgvan av jólagávum eisini voksin, Í ár var sostatt talan um 1000 gávir. So nógvar gávir hava vit ongantíð fingið áður, sigur Árni.




*Bilurin fór sera illa – men førarin slapp við lívinum*

*ynd: Jens Kristian Vang*

## Gekk sjálvur frá bilinum

**Eitt undur, at førarin slapp frá vanlukkuni við lívinum**

FERÐSLUÓHAPP
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ein ferðsluvanlukka uppi á Oyggjarvegnum fríggjamorgunin kundi lættliga elvt til stóran skaða, tá ein bilur fór bóltandi út av vegnum og lendi á takinum. Bilurin kom suðureftir, men í svinginum omanfyri ríðibreytina, hevur førðin helst verið í meira lagi. Í øllum førum fór hann sendandi út av vegnum og bóltandi omanav, til hann lendi á takinum, við einum stórum steini inn gjøgnum rútin føraramegin.

Tann umleið 30 ára gamli maðurin, sum var einsamallur í bilinum, sat fastur í bilinum, men fekk kortini sjálvur ringt til 112. Hann slapp tó leysur og gekk sjálvur frá biliunum, niðan á vegin, haðan hann varð fluttur á Landssjúkrahúsið til kanningar.

- Enn einaferð var tað trygdarbeltið, sum tryggjaði, at ein vanlukka ikki endaði í sorgarleiki. Tað er eitt undur, at maðurin slapp frá vanlukkuni við lívinum, segði Hermann Brekku, løgreglumaður, sum vit prátaðu við á staðnum.